# Óvanliga nógv skip á Havnini

*Gjáramorgunin vóru so nógv fremmand skip á Havnini, at neyðugt varð at leggja tey uttan á hvørt annað út eftir molanum*

John Johannessen

Trongt var út eftir molanum í Havn fríggjadagin. Har lá ein røð av útlendskum skipum. Flestu teirra vóru íslendsk og donsk nótaskip, ið vóru komin inn á Havnina at bunkra. Men vóru eisini ein russiskur trolari, ið var komin at landa, og eitt skotskt havrannsóknarskip, ið var komið á vitjan.

Asbjørn Heinesen á havnarskrivstovuni sigur tað vera heilt tilvildarligt, at tað vóru so nógv skip á Havnini fríggjamorgunin. Hann sigur, at tað vanliga koma nógv skip á Havnina, men tað er ógvuliga sjáldsamt, at so nógv skip koma í senn.

Skipini liggja kortini ikki leingi á Havnini, tá tey koma. Íslendsku nótaskipini skuldu avstað aftur beinan vegin, tey høvdu bunkrað, men kortini skuldu donsku nótaskipini verða liggjandi til mánadagin. Orsøkin til hetta er, at tað eru so nógvir føroyingar við donsku skipunum, og ynskja hesir at steðga eina løtu, tá teir eru í Føroyum.



# Fullveldismálið ørkymlar grønlendingar

*Grønlendingar kenna seg nú noyddar at gera dønum greitt, at teir ynskja víðkað sjálvstýri og ikki fullveldi*

John Johannessen

Grønlendingar eru ræddir fyri, at fullveldisætlan føroyinga kann forða fyri grønlendska arbeiðinum fyri víðkaðum sjálvstýri innan fyri ríkisfelagsskapin.

Hetta skrivar danska blaðið, Berlingske Tidende, 11. mei. Sjálvstýrissinnaði varalandsstýrisformaðurin, Josef Motzfeldt, úr Inuit Ataqatigiit sigur við blaðið, at honum hevði dámt betur, um tað í staðin varð arbeitt fyri at finna ein meira javnverdan felagsskap millum tey trý londini innan fyri ríkisfelagsskapin.

Kortini leggur Josef Motzfeldt afturat, at tað nú kundi sæð út til, at føroysku samráðingarnar nærkast grønlendska modellinum.

## Kunna danskar fjølmiðlar

Fyri at vissa vanliga danan um, at Grønland ikki ætlar sær at slíta seg leyst úr ríkisfelagsskapinum, eins og Føroyar, hevur grønlendska sjálvstýrisnevndin gjørt av at fara til Danmarkar at kunna donsku miðlarnar um grønlendsku sjálvstýrisætlanirnar.

Formaðurin í grønlendsku sjálvstýrisnevndini, Jakob Janussen, sigur við Berlingske Tidende, at politisku flokkarnir í Danmark væl vita, at Grønland vil nakað annað enn Føroyar á sjálvstýrisleið. Men kortini eru grønlendingar bangnir fyri, at vanligi danin fær eina fatan av, at grønlendingar fylgjast við føroyingum í fullveldismálinum.

Tí halda grønlendingar tað hava týdning at gera dønum greitt, at Grønland framhaldandi ynskir at verða verðandi í ríkisfelagsskapinum.

Grønlendska sjálvstýrisnevndin kemur til Danmarkar 15. juni. Hetta er sama dag, sum triði samráðingarfundurin millum Føroyar og Danmark um ríkisrættarligu støðuna skal haldast.

Jakob Janussen, formaður í grønlendsku sjálvstýrisnevndini, sigur við Berlingske Tidende, at ferðin til Danmarkar langt síðani er løgd til rættis. Tí er tað av tilvild, at sjálvstýrisnevndin kemur til Danmakar sama dag sum Føroya Landsstýri.

## Bangnir fyri at missa Grønland

Høgni Hoydal sigur við Berlingske Tidende í gjár, at hann heldur tað vera heilt ógrundað, at grønlendingar skulu vera bangnir fyri, at mótstøðan í Danmark móti føroyska ynskinum um fullveldi skal hava negativa ávirkan á arbeiðið í grønlendsku sjálvstýrisnevndini.

Høgni Hoydal sigur, at danir sjálvsagt vita, at føroyska stríðið fyri fullveldi ikki kann samanberast við tað grønlendska. Men hann heldur, at danska stjórnin uttan iva er bangin fyri at tað fer at skapa fyridømi í Grønlandi, um Føroyar fáa eina góða avtalu við Danmark.

– Danir kunnu væl liva við, at Føroyar fer úr ríkisfelagsskapinum, men tað hevði verið verri, um Grønland gjørdi tað sama, sigur Høgni Hoydal.

Høgni Hoydal heldur tað annar ikki vera serliga gløgt av grønlendingum at halda fundin í Keypmannahavn sama dag sum samráðingarfundurin millum Føroyar og Danmark er, um ætlanin við fundinum veruliga er at vísa á munin á ynskjunum hjá ávikavist Grønlandi og Føroyum.

## Høgni má leggja fordómarnar til viks

Jan Petersen, framsøgumaður í Føroyamálum hjá danska sosialdemokratiet, heldur, at Høgni Hoydal eigur at gevast við at skuldseta danir ógrundað og harvið grugga kjakið um ríkisrættarligu støðuna.

– Vit hava stóra virðing fyri tí, grønlendska fólkið og føroyska fólkið, hvør í sínum lagi, ynskja, sigur Jan Petersen við Berlingske Tidende.








# Vit skulu lata sum einki tá ið Paul Watson kemur

*Bæði Grindamannafelagið og politiið halda, at um Paul Watson kemur til Føroyar, er tað mest umráðandi av øllum, at vit eru sinnilig og ikki lata hann øsa okkum upp til ein samanbrest*



*– Vit skulu drepa grind, sum vit altíð hava gjørt, hóast Paul Watson skuldi komið. Men tað skal vera mín áheitan á føroyingar, at vit gera okkara arbeiði samvitskufult tá ið vit drepa grind, so at onki verður at finnast at, sigur formaðurin í Grindamannafelagnum*

Áki Bertholdsen

–Kemur Paul Watson, skulu vit bara lata sum einki og annars verða siðilig og sinnilig, sum vit plaga at vera.

Bæði Grindamannafelagið og politiið eru samd um, at skuldi tað hent, at tiltikni umhvørvisverndarmaðurin, Paul Watson, veruliga kemur til Føroya, ræður tað um hjá føroyingum ikki at leypa framav.

–Eg haldi, at vanligi føroyingurin skal ikki leggja seg út í nakað sum helst við PaulWatson, sigur Jón Klein Olsen, varapolitiinspektørur

–Tað ræður um ikki at fáa ein samanbrest við hann, tí hann er fjølmiðlamaður burturav og tað, sum hann mest av øllum er úti eftir, tað er júst at fáa so nógva umtalu í fjølmiðlum sum gjørligt.

–Tí ræður tað um hjá okkum at fara fram við skili, so at hann í hvussu so er ikki fær tað burturúr, at vit leypa framav, leggur hann afturat.

## Fer at troyttast

Eisini Ólavur Sjúrðarberg, formaður í Grindamannafelagnum, sigur, at tað er ógvuliga umráðandi, at vit vera sinnilig og ikki leypa framav.

Hann sigur annars, at fyrrenn hann sær Paul Watson í Føroyum trýr hann ikki rættiliga uppá, at hann kemur.

–Hann hevur hótt við at koma til Føroyar í nógv ár, men hann er ongantíð komin enn. So eg veit ikki, um eg skal trúgva honum hesuferð, sigur hann

–Men hetta er alt eitt lið í royndunum já honum at útvega Sea Shepherd pening. Og tað er greitt, at fólk tíma ikki at blíva við at betala, um onki hendur,

– Tí noyðist hann at skipa fyri onkrum tiltaki av og á.

Ólavur Sjúrðarberg sigur, at Grindamannafelagið hevur ikki tosað so nógv um, hvussu vit skulu fyrihalda okkum mótvegis Paul Watson, um hann kemur.

Men hann heldur, at tað er ógvuliga umráðandi, at vit føroyingar eru sakligir og siðiligir og ikki leypa framav.

Hann sigur, at okkara styrki er, at verður Paul Watson í Føroyum í langa tíð, uttan at nakað hendir, fer manningin at troyttast, tí tey tíma ikki at liggja í Føroyum í mánaðir, uttan at nakað hendir. Og so fer tiltakið hjá honum at dovna burtur av sær sjálvum.

## Áheitan á føroyingar

Annars sigur Ólavur Sjúrðarberg, at tað er avtalað, at tann fyrsta grindin sum kemur, skal merkjast og sleppast avstað aftur.

Í hvussu so er, er hetta galdandi um tann fyrsta grindin kemur vestanfyri.

– Flestu grindirnar, sum eru í Føroyum, eru í Vágum og tí liggja sendararnir, sum hon skal merkjast við, har vesturi.

–Fer Paul Watson at royna at steðga teirri grindini, leggur hann seg út í altjóða, vísindaligt arbeiði og tað kann skjótt blíva ein trupulleiki hjá honum.

*Men tað kunnu koma aðrar grindir?*

–Ja, og eg haldi, at føroyingar skulu drepa grind sum vant, hóat Paul Watson er her.

–Men tað skal vera mín áheitan á føroyingar, at syrgja fyri, at gera sítt arbeiði til lítar, bæði ruddiligt og samvitskufult, tá ið vit drepa grind, so at onki er at finnast at.

– Gera vit tað, heldur grindamannaformaðurin, at vit hava ikki so nógv at óttast, tí føroyingar eru á ongan hátt so illa lýddir úti í heimi, sum ávísir umhvørvisfelagsskapir vilja gera tað til.

*Men fær tað Paul Watson at steðga sínum mótmælum, um vit fara væl um grindna?*

–Nei tað ger tað ikki. Tað nyttar ikki at prædika fyri pávanum, og tað nyttar ikki at vera meiri katólskur enn hann. Og Paul Watson er so „frelstur" í sína sak, at tað nyttar einki at tosa skilatos við hann.

– Tað nyttar heldur onki at greiða honum frá, at tað eru onkustaðni ímillum 750.000 til 1.000.000 grindahvalir í Norðuratlantshavi og at okkara grindadráp tí er á burðardyggum grundarlagi, tí vit taka bara umleið 1/1000 part av stovninum um árið og tað hevur onga sum helst ávirkan á hann.

– Men kortini skulu vit ikki geva teimum nakað at finnast at, leggur Ólavur Sjúrðarberg dent á.

Hann sigur, at Paul Watson er nevniliga ein partur í tí ídnaðinum sum kann nevnast mótmælisídnaðurin. Tann ídnaðurin skal eisini liva, og tí noyðist hann at skipa fyri tiltøkum av og á, annars verður tað ov svangligt hjá honum og hann doyr út.

–Og eydnast tað teimum fyrst at beina fyri grindadrápi finna tey bara upp á okkurt annað at mótmæla.

– Ogin veit, kanska verður tað eitt bann ímóti at fiska, ella ímóti fuglaveiði, ella ímóti at drepa seyð, sum verður tað næsta, ið hesir felagsskapir fara at stríðast fyri.

*Paul Watson sigur, at hann væntar harðar samanbrestir við føroyingar?*

–Tað vænti eg nú ikki. Í hvussu so er verður tað ikki samanbrestir við vanliga grindamannin.

– Vit mugu ikki gloyma, at vit hava loyvi at drepa grind í Føroyum. So kemur tað til samanbrest, verður tað við tey, sum skulu útinna lógina.

–Men tað kann væl vera, at Paul Watson fer at royna at provokera føroyingar til at leypa framav, men tað er júst tað, sum ikki má eydnast honum. Besta vápnið, vit hava ímóti honum, er at vera siðiligir.

Ólavur Sjúrarberg nevnir sum dømi eina herferð, sum Paul Watson var á í Noregi fyri einum tveimum árum síðani.

–Norðmenn vóru sinniligir, men tá eydnaðist tað Paul Watson at provokera til ein samanbrest, sum førdi við sær, at skip hansara og eitt norskt vaktarskip stoyttu saman.

– Í altjóða fjølmiðlunum fekk hann tað burturúr, at norska sjóverjan hevði roynt at sigla hann niður, hóast tað var beint øvugt.

Ólavur Sjúðrarberg sigur, at seinast, Paul Watson var her, vóru føroyingar fullkomiliga lamnir, tí vit vóru so illa fyri, sum vit kundu, tí Tjaldrið var á beding og onki danskt verjuskip var her, so einasta skip, vit høvdu, var Ólavur Halgi.

–Nú skuldu vit eftir øllum at døma verið frægari fyri í so máta, skuldi ein støða tikið seg upp, sum krevur tað, sigur Ólavur Sjúrðarberg.

